Epileptikarafelg Føroya skipar fyri fyrilestrum á:

Hotel Hafnia hósdagin 03.06.2004 kl. 15.00 - 19.00

Heitið á fyrilestrunum verða:

Bjarki á Rógvi Hansen, neurologur á Ríkissjúkrahúsinum tosar um:
- Epilepsi og kynslív hjá fólki við epilepsi og hvørji árin heilivágurin hevur á tey.
- "Ketogen diæt", sum er ein kostviðgerð fyri fólk við epilepsi.
- Teir nýggjastu møguleikarnir við kirurgiskari viðgerð.

Ellids Kristensen, yvirlækni og sexologur á Ríkissjúkrahúsinum tosar um:
- Varandi brek og kynslív.

Kl. 20.00 eru ung við epilepsi og ung við diabetis vælkomin á Hotel Hafnia til eina hugnaløtu, har Bjarki og Ellids verða við. (Henda hugnaløta er ókeypis).

Møguleiki verður at seta spurningar.

Fyrilestrarnir eru ætlaðir øllum við epilepsi og teimum við varandi breki annars, fólki í sjúkrahúsverkinum, heimarøktini, eins og stuðlum undir stuðulfólkaskipanini o.l., lærarum, pedagogum og annars øllum, ið hava áhuga í hesum fyrilestrum.

Tilmelding fer fram á tlf.: 26 30 78 (Randfríð Sørensen) og 21 97 93 (Mari Johannesen), innan mánadagin 31. mai 2004 kl. 12.00.

Kostnaðurin er kr. 150.00 fyri hvønn luttakara og kann flytast á Postgiro nr. 70.548 ella Føroya Sparikassa nr. 174.413.7. Í prísinum er ein máltíð á Hotel Hafnia eftir fyrilestrarnar.

Epileptikarafelag Føroya

Rørir tað teg?

Evangelisk møtirøð við Robert Bwalya

29.mai - 04.juni

Leygardag 29.05..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Hvítusunnudag 30.05..........kl.11.00
Robert Bwalya talar

Hvítusunnukvøld 30.05..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Hvítusunnukvøld 30.05..........kl.22.00
Lovsangskvøld

2.Hvítusunnudag 31.05..........kl.11.00
Robert Bwalya talar

2.Hvítusunnukvøld 31.05..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Týsdag 01.06..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Mikudag 02.06..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Hósdag 03.06..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Fríggjadag 04.06..........kl.19.00
Robert Bwalya talar

Øll møtini verða hildin í Filadelfia, Landavegur 22.

Les meir á www.filadelfia.fo

Barnamøtir á Hvítusunnu í Ytra skúla.
Hvítusunnudag ....kl.11.00 & kl.19.00
2. Hvítusunnudag kl.11.00

Filadelfia - Landavegur 22 - Tel 314828 - www.filadelfia.fo

Pedagogur til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 t. viku, at byrja 1. august 2004.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. august 2004.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs leiðara tlf. 225222/444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 14. juni 2004 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 27. mai 2004

Fuglafjarðar býráð

TFT útbúgving

Verður veruleiki í Føroyum

Útbúgvingin byrjar vikuskiftið 19.-20. juni, heldur fram í september og endar í november.
Nærri fæst at vita á
tel 31 88 21 ella á telduposti: sigmo@post.olivant.fo

Avmarkað næmingatal

Hjálpir móti strongd, tramaum, fobium, angist, tunglyndi, alkoholmisnýtslu royking og mongum øðrum.

www.tftdanmark.dk

TFT viðgerð

Hjálpir móti strongd, tramaum, fobium, angist, tunglyndi, alkoholmisnýtslu royking og mongum øðrum.

Viðgerð verður 18. - 20. juni

Tilmelding á tel. 318 821 ella við telduposti: sigmo@post.olivant.fo

www.tftdanmark.dk

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin

www.sosialurin.fo

Vikuskiftisskeið

til endurtøku av koyrikorti og eftiransandi koyriroynd verður leygardagin 29. mai kl. 10-16.
Skeiðið tekur 2 vikuskifti.

Motorsúkkluskeið

byrjar týsdagin 1. juni kl. 19.30

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99 • 21 10 96
John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Hýruvognsloyvi

Í Tórshavnar kommunu eru 3 hýruvognsloyvi leys at søkja.

Vísast skal á, at sambært grein 8 í reglugerðini um hýruvognsstøðir í Tórshavnar kommunu, skulu umsøkjarar hava váttan fyri, at teir koma at koyra frá støð.

Umsóknarblað fæst í Snarskivuni, umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. juni 2004.

SNARSKIVAN

Frá Kvívíkar Skúlastýrið

Kvívíkar Skúlastýrið bjóðar øllum foreldrum at næmingum, sum ganga í Kvívíkar Skúla til foreldrafund mikukvøldið 02. juni 2004 kl. 19.00 í Kvívíkar Skúla.

Skrá:
Ársfrágreiðingin

Kvívíkar Skúlastýrið

Føroya Fótbóltsskúli

Fótbóltssamband Føroya skipar aftur í ár fyri fótbóltsskúlum kring landið.

Skúlarnir eru fyri børn í aldrinum 8-14 ár.

Í ár verða skúlarnir tríggir í tali:

24. juni 2004	kl. 13.00-18.00 og 25. juni 2004	kl. 10.00-16.00 í Sandavági
01. juli 2004	kl. 13.00-18.00 og 02. juli 2004	kl. 10.00-16.00 í Vági
09. juli 2004	kl. 13.00-18.00 og 10. juli 2004	kl. 10.00-16.00 á Toftum

Høvuðsvenjarar eru:
Atli Gregersen, Páll F. Joensen, Álvur Hansen og Ábraham Løkin.

Tá skúlarnir enda, fáa børnini eina T-shirt og eina sodavatn, ið Føroya Bjór hevur latið, og góðgæti, ið P/F Kjølbro heilsølan hevur latið. Somuleiðis fáa tey prógv og ein fótbólt.

Tilmeldingarbløð verða løgd út til feløgini, á posthúsini og fólkaskúlarnar kring landið 04. juni 2004, og er tilmeldingarfreistin 14. juni 2004.

Fótbóltssamband Føroya

Faroe Marine Products

FO-520 Leirvík

Í sambandi við útbygging og økt virksemi á virkinum verður við hesum søkt eftir:
- Smiði/handverkara,
- Arbeiðsfólki til skiftivakt at passa turkingina, truckloyvi krevst

Eisini verður søkt eftir:
- Vaskifólki til fabrikkina

Vinarliga setið tykkum í samband við okkum á telefon: 443399

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Søla av skervi og asfalti

Viðv. sølu frá skerv- og asfaltverkum okkara.

Sagt verður frá, at frá 1. juni 2004 ber til at nýta gjaldskort á hesum støðum:

Hundsarabotni
Lambareiði
Porkeri

Harumframt er nú møguligt at gjalda ígjøgnum heimabanka/heimagreiðslu.
Eisini er møguligt at gera vanliga flyting gjøgnum peningastovn.
Verður goldið við giro, er neyðugt at vísa girokvittan, tá ið vøran verður avheintað.
Serligu kvittanirnar, sum hava verið nýttar higartil, eru ikki neyðugar longur.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Hølir í Tórshavn til leigu

Hølir sum eru vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

Hølini er uml. 100 m² og er møguleiki fyri at víðka til 200 m². Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 m²/1400 CBM, ið er vælegnað til goymslu, ídnað og annað virksemi. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

Sera gott útsýni og tætt við høvuðsveg.

Sosialurin
Box 76 · FO-110 Tórshavn
Bill.mrk. 609

Hondlesing í Tórshavn og Klaksvík

frá 19. juni

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein øðrvísi máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð í vikuskiftinum á
tlf. +45 39664880 ella +45 60718683